## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og mjørkaflókar, men eisini sólglottar. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul av landsynningi og stundum regn, týsdagin andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Teitur og Eivør á palli saman



**Í kvøld fara tvey av størstu talentunum í føroyskum tónleiki á pall saman í Norðurlandahúsinum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Tey hava bæði roynt at vinna Prix Føroyar tónleikakappingina sum sangarar, bæði hava fingið góð ummæli í útlandinum, og bæði hava eyðsýndar tónleikaligar dygdir.

Talan er um Eivør Pálsdóttir og Teitur Lassen, sum í kvøld fara at spæla saman á konsert í Norðurlandahúsinum.

Konsertin er partur av Listastevnu Føroya, sum fór av bakkastokkið mikudagin, og Eivør og Teitur skulu í kvøld fyri fyrstu ferð spæla saman á konsert.

Teitur er búsitandi í Danmark, og hann ferðast nógv í útlandinum. Hann leggur alla orku í tónleikaliga arbeiðið, og tað hevur longu borið frukt.

Teitur gjørdi fyri stuttum eina útgávuavtalu við eitt plátufelag í Los Angeles, og hann er eisini sloppin fram at í útlendskum sjónvarpi.

Millum annað hevur Teitur havt tveir sangir hjá sær við í sjónvarpsrøðini »Jack and Jill«, sum Warner Brothers framleiða.

*Teitur Lassen fer í kvøld at spæla á konsert saman við Eivør Pálsdóttir í Norðurlandahúsinum*

### Góð ummæli

Eivør Pálsdóttir er kend sum sangari í rockbólkinum Clickhaze, men hon hevur eisini givið eina solofløgu út, og hon hevur eisini ferðast víða við sínum egna bólki, sum spælir tónleik, sum leggur seg meira á jazz- og popbógvin.

Tá Clickhaze luttók á donskum festivali fyri nøkrum vikum, síðani vóru ummælini av avrikinum hjá Eivør serstakliga góð. Danir halda, at tað er so stórt potentiali í songkvinnuni úr Gøtu, at hon fyrr ella seinni fer at fáa gjøgnumbrot uttan fyri Føroyar.

Sama skoðsmál hevur Teitur eisini fingið, og hann stríðist fyri sínum møguleika í útlandinum.

Men nú verða tey bæði at síggja og hoyra á heimligum palli, og tað verður í kvøld, tá konsertin við teimum verður í høllini í Norðurlandahúsinum kl. 21.00.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 20 |
| Tromsø | 18 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 32 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 36 |
| Malta | – |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | – |
| Sydney | 18 |
| New York | 35 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1000 hPa. norðan fyri Ísland grynnist og ein hátrýstryggur vestan fyri Ísland verður yvir Føroyum fríggjadagin.




Ein hátrýstryggur yvir Føroyum fer eystureftir og eitt lágtrýst við Hvarvið fer spakuliga móti Íslandi. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/08 kl. 06[00]– 09/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,7°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 08/08 kl. 06[00]– 09/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í aug.: 9,0 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes

## VESTFALLSKYRRINDI

4. august: Fullmáni
5. august: Mánin longst frá jørðini
12. august: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. aug | 11.39 | 23.57 | 10.39 | 22.57 | 10.54 | 23.12 | 01.21 | 13.39 | 02.21 | 14.39 | 09.54 | 22.12 |
| 11. aug | — | 12.16 | 11.16 | 23.50 | 11.31 | — | 01.57 | 14.16 | 02.57 | 15.16 | 10.31 | 23.05 |
| 12. aug | 00.50 | 13.24 | — | 12.24 | 00.05 | 12.39 | 02.50 | 15.24 | 03.50 | 16.24 | 11.39 | — |
| 13. aug | 02.00 | 14.36 | 01.00 | 13.36 | 01.15 | 13.51 | 04.00 | 16.36 | 05.00 | 17.36 | 00.15 | 12.51 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. aug | 08.54 | 21.12 | 11.54 | — | 00.36 | 12.54 | 11.24 | 23.42 | 00.21 | 12.39 |
| 11. aug | 09.31 | 22.05 | 00.12 | 12.31 | 01.12 | 13.31 | — | 12.01 | 00.57 | 13.16 |
| 12. aug | 10.39 | 23.15 | 01.05 | 13.39 | 02.05 | 14.39 | 00.35 | 13.09 | 01.50 | 14.24 |
| 13. aug | 11.51 | — | 02.15 | 14.51 | 03.15 | 15.51 | 01.45 | 14.21 | 03.00 | 15.36 |